# Sjáldsom fyribrigdi við Mývatn



Um tú ferðast á leiðini við Akureyri á íslendska norðurlandinum, so er ikki langt til Mývatn, ið er ótrúliga vakurt. Her finnast fuglar í kanska miljónatali og nógv onnur sjáldsom fyribrigdi. Storknaði lavaslott, heitar keldur, kókandi og stinkandi runudýki og mýggjabitar í óendaligum mongdum. Vatnið er ógvuliga grunt, bert tveir til fýra metrar, og hetta saman við tí klára vatninum, nógvu víkunum og smáoyggjunum, hevur skapt eitt satt fuglaparadís. Sólarljósið gevur góð gróðrarlíkindi fyri vatnplantum, sum aftur geva kyktum og fiski góð livikor. Vert er at hava kikaran við fyri at kunna fylgja betri við tí fantastiska fuglalívinum við Mývatn.



















